

www.oljan.fo

**Jan Müller** 31 - 08 - 2011

# Ramform seismikkskip á Havnina við breki

Vaksandi leitivirksemið um okkara leiðir gevur eisini arbeiði til føroyskar fyritøkur. Leitingin eftir olju í Norðuratlantshavi hevur við sær, at skip við tilknýti til hesa vinnu javnan leggja leiðina í føroyskar havn. Hetta hendi herfyri, tá eitt av teimum stóru og nýggju seismikkskipunum á veg til Grønlands legði leiðina inn á Havnina at umvæla brek. Hetta var eitt av tí gitna og tøkniliga sera framkomna Ramform slagnum, ið hevur rættiliga sjáldsamt skap. Hetta er fyrstu ferð at eitt av hesum slagnum av seismikkskipum kemur í føroyska havn. Skipið, Ramform Challenger hevði eftir øllum at døma fingið okkurt brek í propellina har afturi. Kavari frá Green Marine Divers kannaði skaðan. Skipið var annars á veg til Grønlands at skjóta seismikk fyri oljufelagið Encana, sum hevur leitiloyvi har. Myndatekstir Serstaka Ramform seismikkskipið vitjaði fyri fyrstu ferð føroyska havn. Kavarar frá føroysku fyritøkuni Green Marine Divers kannaðu skaðan. Thor í Hósvík umboðar nógv av frálandaskipunum, sum koma í føroyska havn.